**Vestmanna skúli**
Toftavegur 12, FO-350 Vestmanna · Føroyar
Tlf. 298 470100 · Fax +298 470101 · e-mail: vestmanna@skulin.fo

# Lærarastarv í Vestmanna skúla

Tíðaravmarkað starv í Vestmanna skúla fyri lærara í barnsburðarfarloyvi verður lýst leyst til setanar frá **mánadegi 30. oktober 2006 til 30. juni 2007.**

**Søkt verður eftir lærara fyri lærara í barnsburðarfarloyvi**

**Søkt verður eftir lærara, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum

**Harumframt skal lærarin hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum/lærugreinaøkjum:**
- undirvísa gentum í ítrótti og í svimjing
- 2., 3. og 7. fl. í ítrótti og 1. og 3. fl. í svimjing
- 4. og 5. fl. í heimkunnleika
- 6 fl. í nátt/tøkni
- 8. og 9. fl. í kristni
- 1., 2. og 3. fl. í handverki og list
- 7. fl. í lívfrøði

**Førleikakrøv**
Lærarаútbúgving og linjuleistur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum og svimjilæraraprógv.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er Vestmanna skúli. Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokki 18.1-27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Starvið verður sett sum tíðaravmarkað starv fyri tíðarskeiðið 30. oktober 2006 - 30. juni 2007.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 18. sept. 2006, kl. 16.00.**

Fleiri upplýsingar um størvini fært tú við at ringja til Vestmanna skúla tlf. 470100 ella til skúlastjóran tlf. 424449 ella við at senda teldupost til skúlastjóran olavur.winther@skulin.fo

**Í Vestmanna Skúla** eru 210 næmingar og 25 lærarar.
Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/ves/

Vestmanna Skúli er kendur fyri at vera næmingavinarligur og grønur skúli. Skúlin arbeiðir annars í løtuni við hesum evnum: at menna trivnaðin, byrjanarundirvísingina, samstarvið við vinnulívið, tann opna skúlan og at geva næmingunum fjølbroyttar avbjóðingar.

---

**Innlendismálaráðið**

# Deildarstjóri til Náttúru-lendis- og umhvørvisdeildina í Innlendismálaráðnum

Við hesum verður søkt eftir deildarstjóra til Náttúru- lendis- og umhvørvisdeildina í Innlendismálaráðnum.

**Høvuðsuppgávur**
Høvuðsuppgávurnar hjá deildini verða í fyrstu atløgu at gera uppskot til lóggávu á náttúru-, lendis – og umhvørvisøkinum og at samskipa náttúrumál, lendismál og umhvørvismál umsitingarliga.

Harumframt skal deildin umsita ymsa lóggávu, eitt nú náttúrulóggávu, ognartøkulóggávu, matrikullóggávu, tinglýsingarlóggávu, lóggávu um fólkayvirlit, byggi- og býarskipanarlóggávu og umhvørvislóggávu.

Deildin fær ábyrgdina av føroyskari luttøku í altjóða samstarvi á náttúru- og umhvørvisøkinum.

**Førleikakrøv**
Tað er ein treyt, at umsøkjarar hava løgfrøðiliga ella fyri starvsøkið viðkomandi kandidatútbúgving og hava góðan kunnleika til føroyskt mál. Harumframt verður sett sum treyt, at teir hava hollar viðkomandi starvsroyndir.

Umframt omanfyristandandi verður væntað, at umsøkjarar duga og hava innlit í leiðslu, og at leiðsluhátturin er í samsvari við virðisgrundarlagið hjá miðfyrisitingini.

**Løn og setanartreytir**
Starvsheitið er deildarstjóri og verður lønt sambært 37. lønarflokki hjá tænastumonnunum, tó uttan at vera tænastumannastarv. Setanartreytir annars verða sambært avvarðandi sáttmála.

Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**Innlendismálaráðið**
Postrúm 159, Tinganes
110 Tórshavn

og skulu vera Innlendismálaráðnum í hendi í seinasta lagi 18. september 2006.

Umsøkjarar kunnu fáa nærri upplýsing um starvið við at venda sær til Rúna Joensen, aðalstjóra, á telefon 358080.

---

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# Frá Haldórsvíkar Avhaldsfelag

Eydnuhjól, fiskibrunnur og matsøla verður sunnudagin 3. september kl. 16.00. Nógvir góðir lutir s.s lomb, dukkur, bilar, fartlf. fjallstovur og nógvir heimagjørdir lutir.

Vælkomin á eydnuhjól.

**Nevndin**

---

# Almennur fyrilestur um migrenu

Leygardagin 2. september kl. 15.00 verður almennur fyrilestur í Miðlahúsinum við danska neurologinum Steffen Birk. Hann fer at greiða frá um nýggjastu gransking innan migrenu:

Hvat er migrena?
Hvat førir migrenan við sær?
Hvat kann gerast fyri at fáa tað betri?

Fyrilesturin er ókeyps.

**Føroyski migrenubólkurin**

---

# Lærlingur til goymsluna

Vit søkja eftir lærlingi til goymsluna. Í lærutíðini verður tú lærd/-ur í øllum vanligum goymsluarbeiði, umframt at tú fært gott innlit í bilar og KT-skipanir til eykalutir.

Løn sambært galdandi sáttmála.

Umsóknarfreistin er 31. august 2006. Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**BERG MOTORS**
SUZUKI STARAVEGUR 1-3 · 110 TÓRSHAVN

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja á tlf. 31 35 35 og tosa við Karin ella Júst.

*Berg Motors selur bilar av merkinum Suzuki, Subaru, Kia, Mazda, Land Rover og Scania lastbilar. Vit hava eykalutagoymslu til øll bilmerkini og mekaniskt-, plátu-, sproyti- og dekkverkstað*